tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Vinna - og vinna sum ítriv

## *Oddagrein*

Tað er kærkomið, at Vinnumálastýrið hevur lagt eina frágreiðing um landbúnaðin fyri Løgtingið til aðalorðaskifti. Men tað tykist tí løgið, at tað samstundis verður traðkað á búnaðarvinnuna og Jarðarráðið. M. a. verður sagt, at »Jarðarráðið nú er vorðið umskipað og hevur fingið eina meiri professionella leiðslu«. Eina aðrastaðni verður sagt: »Vantandi handhevjanin av lógarinnar ásetingum kann partvíst tilskrivast, at eingin politikur hevur verið fyri landbúnaðin«. Harafturat verða undanfarin landsstýrið skuldsett fyri at hava hugsað um eina politiska heldur enn eina fakliga umboðan í Jarðarráðnum.

Ikki eiti á skortfleingju at geva teimum bøndum, leikum og lærdum, sum hava sitið í Jarðarráðnum. Hava stungið út í kortið og veitt lán úr Jarðargrunninum, so vinnan hóast alt er komin upp á tað stig, sum hon er komin. Teir valdu limirnir skulu meta um, hvat er rætt ella ikki rætt. Men tilfarið at taka støðu út frá, skal vera professionelt. Og Føroya Jarðarráð hevur sanniliga eina professionella leiðslu og er ein vælvirkandi stovnur. Tí virkar hetta »sparkið« ikki sørt við síðuna av.

– Hvar hevur almenni búnaðarpolitikkur vantað? M. a. í tí at Jarðarráðið hevur ikki havt manning at hava eftirlit við landbúnaðarvinnuni. Talað verður um, at nú skal vera møguleiki fyri, at bøndur skulu kunna missa garðar. Eftir verandi búnaðarlóg hava bøndur bústaðar- og framleiðsluskyldu. Og teir, sum ikki halda hesar treytir, skulu ikki sleppa at sita við gørðum. Spurningur er partvíst, um nogvir ikki sita við gørðum, hóast hugurin er lítil, og partvíst er spurningurin um vantandi ráðgeving, motivatión og eftirlit.

Vit kunnu staðfesta, at so at siga øll mjólk kemur fra festigørðum, Somuleiðis stóri parturin av kjøtinum, sum verður selt at turka. Búnaðarúrdráttirnir koma frá teimum størru gørðunum. Harafturat kemur so eitt hav av smærri festum. M. a. prestajørð, sum varð bytt út, tá tað hevði ein týdning at hava eina mørk, hálvmørk, ella tvær merkur. Men hetta hevur lítlan og ongan týdning í dag, og kann sammetast við smábýttu óðalsjørðina.

Kunnu vit fáa meira burtur úr jarðarbrúksvinnuni enn mjólk og kjøt? Hvussu við epluim, fenaði ella grønmeti? Seta vit okkum fyri at virka meira, so eiga vit helst eisini at hugsa um bygnaðin. T. d. leggja festi saman, so tey gerast størri og kanska burðardygg. Vit fingu kanka bøndur, sum kundu liva av tí, sum jørðin gevur. Avgera vit hinvegin, at tað loysir seg ikki at økja búnaðarframleiðsluna, so eiga vit eisini at hugsa um at privatisera ella leiga út tey smærru festini, so fleiri føroyingar fingu høvi at ogna sær ella leiga sær nakrar gyllin at hava nakrar seyðir. Tí, hví skulu nøkur - m. a. fólk í føstum størvum - hava frammíhjárætt at hava eitt festi.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Nær er ovboðið?

Útisetar hava nú innanfyri bert ein mánaða sæð ikki færri enn tríggjar royndir frá frelstum tjóðveldismonnum at »umvenda« danir til loysingarmenn.

**Hoydalsbókin**
Tann fyrsta royndin er frá sjálvum propagandaministaranum Høgna Hoydal, sum í lítlum donskum bóklingi roynir at forfalska føroyska eftirkrígssøgu. Í hesi desperatu bók leypur hann allar pínligar veruleikar og præmissur um fyri at útvega loysingarrørsluni eina betri og hampuligari fortíð.

Bókin er næstan heimsmet í manipulation, eftirrationalisering, søguligum ósannindum og grunnu, ódokumenteraðum postulatum.

Fólk skulu kortini kenna ta føroysku søguna væl fyri at varnast, hvussu hann jonglerar og fuskar við faktuellum upplýsingum. Fyri danir er hetta næstan ógjørligt, um teir ikki eru serfrøðingar. Fyri føroyingar, ið eru undir 40 ár, kann tað eisini knípa.

Tað liggur tí stórt pedagogiskt arbeiði fyri framman hjá andstøðuni í Føroyum við upplýsing um og avdúking av slíkari demagogi. Sjálvt Erlendur Patursson hevði ikki hættað sær at verið so primitivur í síni søguskriving, og hann var annars ikki blúgvur.

**Læntar fjaðrar**
Onnur royndin er ein fantastiskur kronikkur hjá pápabeiggja Høgna, harra Gunnari Hoyal, har hann stórt sæð fortelur, at loysingarmenn altíð hava elskað Danmark og dyrkað danska mentan, sungið danskar sangir v.m.

Hetta var fyri flestu útisetar vamlisligur lesnaður. Tí øll vita, at júst hesin sami Hoydal saman við kommunistinum Arne Skovhus var við til at skriva eitt hitt fúlasta álop, ið nakrantíð er gjørt á danir og Danmark í léttisoppasjónleikinum *Færinger frænder* fyrst í 70-árunum. Og tey positivu argument, hann nú brúkar um danir, eru júst tey, sum bæði hann, beiggi hansara og aðrir tjóðveldismenn østu seg upp ímóti, tá ið javnaðarmenn brúktu tey. Nú kunnu tey knappliga brúkast í taktiskum spæli at blíðka donsku opiniónina og skapa ta vælvild, sum tað hjálparleysa landsstýrið hevur forkomið við sínum ússaligu samráðingarevnum. Hetta er sanniliga at pynta tjóðveldisskortin við læntum fjaðrum. Annars er kronikkurin eisini fyltur við leysum søgum og hálvum sannindum, sum einhvør sjálvur kann sannføra seg um. (Politiken 6/4-2000).

**Privatir tvangstankar um identitetsloysi**
Triðja royndin er eitt telefon-interview við tann æstetiskt-hugaða poetin, harra Jóannes Nielsen, har hesin eisini skal royna at neyðtaka donsku lesarafjøldina við sínum heilt *privatu* problemum, sum hann projicerar upp til at vera *national* álvarsmál. Til dømis gremur hann seg um, at hann altíð hevur havt undirlutakenslu og identitetsproblem sum føroyingur. Tað er kanska soleiðis, og so er tað synd í honum, men hann leggur afturat, at allir føroyingar hava tað sum hann – teir eru fullir av religiøsari og nationalari undirlutakenslu! – Hvat billar hetta skaldið sær inni? Eingin sambandsmaður, heldur eingin javnaðarmaður og fáir sjálvstýrismenn hava nakrantíð havt hesi heilt serligu kompleks yvir fyri dønum, sum tjóðveldismenn eru so plágaðir av, og tað er kanska her øll forkláringin liggur.

**Naivi populisturin vorðin kyniskur demagogur**
Tað er hetta privata identitetsproblemið hjá summum føroyingum, sum skal noyða eina heila tjóð til kollektivt sjálvmorð. Og tá ið tað ikki eydnast at forføra føroysku veljarafjøldina, so skal nú tann danska opiniónin takast á bóli, soleiðis at danir møðast av okkum. Tí høvuðkambarnir skulu kroysta sítt ígjøgnum! Maktgirnd er altíð hættislig, men tá ið hon finst hjá fundamentalisti kann hon verða katastrofal. Høgnamenn hava sæð skriftina á vegginum: Tað ússaliga, slitna eystureuropeiska Skoda-vrakið, teir hava roynt at selt føroyingum, sum um tað var ein spildurnýggjur Mercedes, er avdúkað og longu farið at spríkja út gjøgnum sminku, plastikk og klombrutar ábøtur. Fólk hava ikki álit á slíkum sølumanni, sjálvt um hann sleppur at reklamera fyri almennan pening á internótini og á teldusíðu landsins. Maktmisbrúkið í Tinganesi er við at vera fólki ovboðið. Tí noyðast loysingarmenn nú at flyta fjølmiðla-propagandauna niður til Danmarkar.

Men vit eru nógv, ið eru til reiðar at *lofta* teimum!

**Virgar T. Dalsgaard, emigrantur**

# Fá enda á verkfallinum, harra Anfinn Kallsberg

Formenninir fyri skúlanevndirnar fyri skúla við framhaldsdeildum hava í kvøld tosað saman um trupulleikarnar innan fólkaskúlan, ið bert standa við og versna. Sambært lóg eru tað vit, sum hava ábyrgdina av, at øll børn í skúlaaldri fáa neyðuga og lógarkravda undirvísing.

Sáttmaálasettu lærararnir fóru í verkfall tann 8. mars í ár og eru í verkfalli enn. Skúlanæmingarnir, ið brátt skulu til roynd, hava onga undirvísing fingið í alla hesa tíð. Hesum kunnu vti ikki finna okkum í, og hoast vit hava heitt á Føroya Løgting um at taka sær av málinum, so hevur tað bert verið til fánýtis. Og tá ið sáttmálasettu lærararnir nú eisini fara at fora fyri skúlagongd í øllum øðrum skúlum landsins, sum ikki hava verið raktir av verkfalli, mugu vit harðliga átala hetta.

Vit vísa á, at vit ikki taka støðu fyri ella ímóti pørtunum í hesum álvarsmáli, men bert hava barnanna framtíð og tørv við lærdómi fyri eyga. Tí heita vit á tyggum, sum hægsta myndugleika í umsitingini, um at skipa so fyri, at undirvísingin verður tikin uppaftur í øllum skúlum beinanvegin.

**Við hávirðing
Fyri formansskapin
Edvard Hermansen**

# TØKK

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum tóku lut í stóru sorg okkara, tá ið okkara høgt elskaða dóttir

**Súsanna Jakoba Jóhanna Hansen**
**Tvøroyri**

so brádliga varð rykt burtur frá okkum.

Tøkk øll tit, sum tóku yvir, tá ið vit ikki orkaðu meira.

Tøkk tit mongu, sum komu inn á gólvið at heilsa upp á okkum og við einum uggandi orði.

Tøkk fyri forbøn í hesi sváru tíð.

Tøkk fyri uppringingar, fjarrit, brøv og heilsanir.

Tøkk til prestarnar Berg Debes Joensen og Petur Martin Rasmussen fyri troystarrík orð bæði í heiminum og í kirkjuni.

Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara.

Tøkk til býráðið fyri at tit skipaðu fyri ervinum og tøkk øll tit, sum hjálptu til í tí sambandi.

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávu til ungdómsarbeiðið hjá Heimamissiónini.

Tøkk fyri tey mongu vøkru minningarorðini.

Tøkk tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Harrin signi tykkum øll*

**mamma og pabba**

Harrin gav, og Harrin tók, Harrans navn veri lovað. Job 1,21.



# Strikið royndirnar

*Skúlastjórin á Venjingarskúlanum í Havn mælir til at strika fráfaringarroyndirnar hjá framhaldsdeildunum og heldur brúka tíðina til undirvísing*

Edvard Joensen

Tað hevði verið rættari at brúkt ta tíðina, sum annars skuldi farið til royndir, til vanliga undirvísing, sigur Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum í Havn. So kundi árskarakterurin verðið nýttur í próvnum ístaðin, sigur hann.

Skúlagongdin hevur verið so óreglulig, at tað heilt greitt er gingið út yvir førleikan hjá næmingunum, sigur skúlastjórin á Venjingarskúlanum. Tí er tað nógv skilabetri at brúka alla ta tíð, sum fáast kann, til vanliga undirvísing. Tað verður ivaleysa ringt at fáa rættað næmingarnar upp aftur moralskt kortini, heldur hann.

Niels Nattestad sigur, at hann væntar ikki, at tað verður fult so ringt hjá teimum yngstu næmingunum. Men tey, sum hava gingið og hugsað um próvtøku og ikki eru sloppin í skúla, eru heilt givið verri fyri. Her hugsar hann serliga um teir næmingarnar, sum skulu til endaliga roynd í framhaldsdeildini. Tey hava heilt einfalt ikki fingið ta vitan, sum skal til.

»Tí er tað skilagott at brúka tíðina til undirvísing og so bara seta árskarakterin í próvskjølini«, sigur Niels Nattestad.

Hann heldur, at nógv er farið fyri skeyti, sum ikki kann bjargast aftur. Ein partur kann tó fáast innaftur, um farið verður aftur í skúla beinanvegin, og øll tíð fram til endan á skúlaárinum verður brúkt til undirvísing.

Børnini fara helst eisini at merkja hesa støðuna, verið hevur, komandi skúlaár. Taka vit til dømis ein triðja flokk, so hevur hann ikki verið í gjøgnum pensum í eitt nú rokning. Komandi skúlaár verður tað nýggj roknibók, sum brúkast skal. Hon byggir á tað, børnini lærdu - ella áttu at lært - í triðja flokki. Men tá eitt hol upp á ein heilan ársfjórðing er í læruni, kemur sperðil í.

Niels Nattestad, skúlastjóri, vísir tó á, at tað ofta er sami lærarin, sum fylgir flokkinum. So hann kann bjarga onkrum av hesum. Men tað verður nóg torført kortini, váttar hann.

Eisini skal komandi skúlaár fyrireikast, vísir Niels Nattestad á. Og tað ber ikki til, sum er, nú lærararnir ongan sáttmála hava. Hann hevur sum skúlastjóri ikki hóming av, hvussu nógvir tímar skulu brúkast til hvat.

Tað verður eitt rættiligt tak, sum takast skal, tá byrjað verður aftur. Tað verður strævið at vera lærari eftir summarfrítíðina, sigur Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum í Havn.



*Niels Nattestad, skúlastjóri á Venjingarskúlanum í Havn heldur, at tað er skilagott at brúka próvtøkutíðina til undirvísing*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

ROVER

Royn tann nýggja

ROVER 75

Við mest framkomnu útgerðini - í hábærsligum enskum sniði



Vitja okkum Bilframs ningini 2000 H lsi. B surin er beint til vinstru fyri inngongdina

Prísir úr kr. 260.000



**Serfr¿ ingar um ROVER 75:** Bilserfr¿ ingarnir hj Journal / AA h¿vde ikki f rri enn 150 bilmerkir at velja hin besta burtur r.Teir valdu ROVER til "Car of teh Year" og "Business Car of the Year fram um m.a. Toyota Lexus LS 200, Mercedes S og Jaguar S.



Italskir bilserfr¿ ingar, sum valdu ROVER sum "The World's Most Beautiful Automobile - high class saloon", settu ROVER b s vi Ferrari 360 Modena, Audi TT og Mercedes-Benz CL.

*Vælkomin til ein royndartúr*

D. B. Bilar

J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310600